Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn

**Svar**
**uppá**

**skrivligan fyrispurning nr. 10/2015 eftir tingskipanini § 52a til Aksel V. Johannesen, løgmann, um Samhaldsfasta Eftirlønargrunnin, frá Kári P. Højgaard, løgtingsmanni**

**Fyrispurningurin var soljóðandi:**

1. Er ætlan samgongunnar, at Samhaldsfasti Eftirlønargrunnurin skal verða bulurin í nýggju pensjónskipanini?
2. Um Samhaldsfasti heilt ella partvís avloysir núgaldandi pensjónskipan saman við grundupphædd og viðbót, hví hevur hesin ikki somu ásetingar sum galdandi fólkapensjón?
3. Heldur løgmaður tað vera rætt, at føroyingar, sum partvís hava búleikast og arbeitt í Danmark ella Grønlandi, ongan trupulleika hava viðvíkjandi fólkapensjónini, men koma undir 40 ára kravið, ið er galdandi fyri at fáa fult útgjald úr Samhaldsfasta, hóast hesin ikki sá dagsins ljós fyrr enn í 1991?
4. Fer løgmaður at taka stig til at rætta henda skeivleika?

**Svar:**
Í samgonguskjalinum er ásett, at arbeiðið í pensjónsbólkinum heldur fram. Pensjónsnýskipanin skal vera búskaparliga haldfør og lutvíst samhaldsføst, og hon skal tryggja, at peningarenslið í størri mun er í føroyska samfelagnum. Meginreglan er, at øll í Føroyum hava rætt til jøvn og virðilig kor á ellisárum. Skipanin skal eggja fólki at arbeiða eftir pensjónsaldur, um tey hava hug og møguleika til tess. Harumframt skal pensjónsnýskipanin leggja upp fyri, at vit gerast fleiri eldri, og hon skal rætta avleiðingarnar av, at farið varð undir at forskatta pensjónirnar.
Tað er Almannamálaráðið, sum er høvuðsábyrgdarhavandi fyri hesum arbeiði. Arbeiðið fer av álvara í gongd fyrst í nýggja árinum. Miðað verður ímóti at leggja uppskot fyri Løgtingið í komandi tingsetu. Settur verður ein politiskur fylgibólkur at fylgja arbeiðinum.

<u>Til 1.</u> Mín persónliga hugsan er, at Samhaldsfasti Eftirlønargrunnurin skal hava ein størri leiklut í nýggju pensjónsskipanini. Hvussu stóran leiklut Samhaldsfasti Eftirlønargrunnurin skal hava, verður ein partur av arbeiðinum hjá politiska fylgibólkinum, har málið er at finna eina breiða semju.

<u>Til 2.</u> Fremsta orsøkin er helst hon, at Samhaldsfasti er ein arbeiðsmarknaðareftirlønarskipan, meðan fólkapensjónin er ein sosial pensjónsskipan. Ætlanin við nýggju pensjónsskipanini er m.a. at fáa betri samsvar og samanhang millum hesar báðar skipanirnar.

Til 3 og 4. Hetta er ein avbjóðing, sum vit eiga at finna eina loysn á, og verður hesin spurningur eisini ein partur av arbeiðinum við pensjónsnýskipanini.

Í Tinganesi, 4. desember 2015

Aksel V. Johannesen
løgmaður